

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 04 - 2012

# Veteranar til flaggdagshald í London

Langt heimanífrá fyri at tæna hvør sínum fosturlandi og øðrum landi. Hetta vóru lívs lagnurnar og stevnurnar hjá tveimum veteranum, einum breta og einum føroyingi, sum hittust til flaggdagshald í London 25. apríl. Harry Wilson var ein av mongu bretsku hermonnunum, sum vardu Føroyar móti týskinum undir krígnum. Hann fekk sær føroyska konu, og tey búsettu seg í Hull. Harry er í dag 93 ára gamal og man vera ein av teimum bretsku hermonnunum, sum var við í hersetingini av Føroyum, ið enn er á lívi. Konan Hanna, av Apolslagnum í Havn, doyði í fjør. Enn ein veterunur, sum varð við til flaggdagshaldið, Sofus Poulsen, tænti Føroyum í mong ár sum umboðsmaður í Stórabretlandi. Harry og Sofus hálsfevndust og høvdu mong minni at leita aftur á, tá teir møttust á flaggdagshaldinum mikudagin. Sí myndafrásøgn frá flaggdagshaldinum á oljan.fo.